

*Nú er aftur ein nýggjur virkisbygningur reistur í Vági. Tað er Faroe Cold Stores, sum meiri enn tvífaldar frystiorkuna og tá ið nýggjagoymslan er liðug á nýggjárinum, verður munandi meiri skipaferðsla á Vágsfjørði*

# Aftur reisigildi í Vági

**Nú er aftur ein nýggjur vinnubygningur reistur í Vági.Talan er um eina frystigoymslu og nú er frystiorkan í Vági tvífaldað**

VÁGUR
*Áki Bertholdsen*

Tað blíðkar fyri hugaðum monnum. Tað mugu vágbingar sanna. tí hesi seinastu árini er virki eftir virki sett á stovn í Vági og hósdagin var aftur reisigildi niðri á keiini.

Tað er Johan Dahl og hansara samstarvsfelagir, sum aftur hava bygt eina frystigoymslu niðri á keiini, har teir hava eina frystigoymslu frammanundan.

Teir eru eitt sindur seinkaðir eftir upprunaligu ætlanini, men ætlanin er at hon skal vera klár at taka í nýtslu á nýggjárinum, so tað verður lagt nógv fyri, fyri at fáa hana lidna.

Frystigoymslan, sum er, tekur 4.000 tons og tann, sum nú verður bygt afturat, tekur 5.500 tons og sostatt verður frystiorkan meir enn tvífaldað, tá ið hendan er liðug.

Tá ið hendan goymslan er liðug, verða tær báðar klæddar við aluminium fyri at fáa tær at taka seg betri út.

Høllin, sum nú verður bygd, verður fyri ein part gjørt við reolum, hyllum, sum kunnu flytast eftir tørvi.

– Tað ger, at vit verða betri førir fyri at taka ímóti vørum, sum ikki tola so nógv av, eitt nú rækjum, laks og annað, sum ikki tolir at verða stáplað omaná hvørjum øðrum, sigur Johan Dahl.

Frystigoymslan fer at taka 4.500 til 5.000 plattar og av teimum kunnu umleið 1.800 standa á reolum.

Tað eru felagið hjá Johan Dahl, Faromar og bretsku samstarvsfelagir hansara, International Seafood og Orcades Viking Ltd, sum eiga frystigoymsluna.

Umframt frystigoymsluna verður ein høll uppá 400 fermetrar bygt í sambandi við goymsluna, hon skal brúkast at flokka frystivørurnar í, og til plattagoymslu

Tilsamans er talan um eina íløgu upp á átta milliónir.

### Meiri arbeiði

Tá ið frystigoymslan verður útbygt, fer hon at kasta væl meiri arbeiði av sær, enn frystigoymslan ger nú. Sum er, arbeiða eini 30-50 fólk í sambandi við frystigoymsluna, tá ið skip koma at lossa ella lasta.

– Tá ið frystigoymslan er útbygd, verður neyvan fleiri um fleiri arbeiðspláss. Men tað fer at føra við sær, at skipini, sum koma at lossa og lasta, verða væl fleiri, so at arbeiðið verður støðugari.

Hann sigur, at hóast arbeiðsdagarnir ikki eru so nógvir, eru teir rættiliga langir og lønin er tí hareftir, so tað skuldi onki verið í vegin fyri at fingið fulla vikuløn, hóast arbeitt ikki verður hvønn dag.

### Fingið 5.000 fermetrar afturat

Umframt hesa frystigoymsluna, hevur felagið hjá Johan Dahl fingið tilsøgn frá kommununi um eitt stykkið upp á 5.000 fermetrar afturat niðanfyri frystigoymsluna til framtíðar íløgur, men enn er óvist, hvat tað skal brúkast til.

Einaferð var ætlanin at byggja eitt virki til uppsjóvarfisk, men tað er nú slept, í hvussu so er fyribils.

Jóhan Dahl sigur, at arbeitt verður kortini við øðrum ætlanum, men enn er ov tíðliga at av avdúka tær.

### Neyðugt við djúphavn

Johan Dahl sigur, at nú so nógvar útbyggingar verða gjørdar í Vági, er tað alneyðugt, at atløguviðurskiftini verða gjørd nógv betri.

– Tað hevur avgerandi týdning, at djúphavnin, sum tosað so nógv hevur verið um, verður gjørd, tí tað er alt ov lítið atløgupláss sum er og hartil er havnin ov grunn, sum er.

Johan Dahl sigur, at neyðugt verður at gera einar 70 metrar av djúphavn í Vági, annars fer tað ikki at bera til.

– Verður tað málið ikki loyst, fáa vit ein stóran trupulleika, sigur Johan Dahl.

# Nýggjur morgunmaður

ÚTVARP
*Ingrid Bjarnastein*

Nýggja røddin á morgunrásini, sum verður send hvønn morgun frá klokkan 7.30 til 9, er røddin á Bjarna Mohr.

Bjarni er tó ikki nýggjur í Útvarpi Føroya. Hann hevur seinastu árini havt tónleikasendingar og aðrar »lættisoppa«-sendingar sum eitt nú Vaglið við Ginnu Midjord. Í vetur er Bjarni eisini í luftini við fyrrverandi Náttarravnunum, Rúna Jákupssyni og Heðin Arge, í leygarkvøldssendingini Leið 5, sum teir tríggir skiftast um at gera.

Hvat heldur Bjarni Mohr so sjálvur um nýggju uppgávuna, ið honum er givin?

– Eg taki hetta heilt sikkurt sum eina avbjóðing. Áður havi eg bert gjørt leysari uppgávur her, so hetta er heilt avgjørt meira spennandi, sigur Bjarni Mohr.

– Hetta er eisini betri, og er hetta heilt nakað annað. Í tílíkum sendingum kemur tú út millum fólk og prátar við tey.

Bjarni hevur bert verið á Morgunrásini í eina góða viku.

– Sendingarnar eru skipaðar soleiðis, at vit eru tveir, sum standa fyri sendingini hvønn morgun, greiðir Bjarni Mohr frá.

– Tað eru so eg og Hilmar Jan Hansen. Vit skiftast um at senda og hava bakvakt, sum tað eitur. Bakvaktin skal gera innsløg og avtalur til sendingina, so tað verður klárt til tann, ið skal senda. Eisini skal bakvaktin koma við tí størra partinum av tilfarinum í sendingini.

Enn er Bjarni Mohr so nýggjur á rásini, at hann hevur ikki gjørt so nógv innsløg – enn. Men Bjarna verður ynskt góða eydnu við nýggju uppgávuni honum er løgd í hendi.




*Bjarni Mohr umborð Sovereign Explorer fyrr í vikuni ger her eitt innslag til Morgunrásina*
*Mynd: Jan*





Tú ringir bara til Perluna og bíleggur eftir hesi matskrá - skjótt og lætt.
Og vit koyra matin út ímóti gjaldi - tó bert í suðurstreymoy.

**FORRÆTTIR**
**Aspargessuppa** við heimabakaðum breyði
**Seafood cocktail** við heimabakaðum breyði og smøri
**Rækjubland** við heimabakaðum breyði og smøri

**HØVUÐSRÆTTIR**
**Lambasteik** við rómastúvaðum eplum, salati og sós av soðnum
**Heilstokt oksaháryggur** við rómastúvaðum eplum, salati og reyðvínssós
**Lambasteik** við reyðkáli, agurkusalati, súltutoyi, hvítum og brúnkaðum eplum og sós

**OMANÁ**
**Rís a la Mande** við kirsuberjasós
**Frísk fruktsalat** v/rákremi
**Heimagjørd triffli**

**PRÍSIR** Høvuðsrættur.....100;- 2 rættir...120;- 3 rættir...140;-

**Jólagrýtu**
við oksakjøti í rómasós við konjakk.
Rís og flute afturvið
49;-

Perlan
TEL 31 50 61

**Jólaplatt:**
Egg og rækjur, dunna, fiskur, rivjasteik, ostur og Rís a la Mande.
Breyð og smør afturvið
85;-




# Gera nú eisini BIP-støð í Vági

**Vágbingar eru nú í ferð við at gera eftirlitsstøð fyri triðjalandsfisk. Tað eru vinnulívið sjálvt, sum betalir gildið saman við kommununi**

VÁGUR
*Áki Bertholdsen*



*Nú er eisini Vágur góðkend sum marknaðeftirlitsstøð, ella BIP-støð, sum tað verður nevnd á fakmáli, fyri triðjalandsfisk sum skal flytast til okkurt ES land og sjálv eftirlitsstøðin verður liðug í vár*

Nú verður eisini ein ein BIP-støð gjørd í Vági.

Ein BIP-støð er ein marknaðeftirlitsstøð, har triðjalands fiskur, sum skal inn í ES, skal góðkennast, áðrenn hann sleppur inn.

BIP-støðin er 120 fermetrar og hon kostar 700.000 krónur. Hon verður liðug í vár. Í støðini er eitt rúm, har vøran kemur inn, umframt kanningarstova, matstova, brúsa og aðrir hentleikar, sum krevjast av eini slíkari støð.

Tað er vinnulívið í Vági sjálvt, tvs alifyritøkan hjá Hera Hjelm og felagið, sum eigur frystigoymsluna, sum gera og betala støðina, saman við Vágs Kommunu.

Tað verður eisini frystigoymslan, sum skal reka støðina.

Men tað vera almennu, føroysku myndugleikarnir, sum koma at hava tað eftirlitið, sum skal vera á eini slíkari støð og hon kemur sostatt at standa til taks hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sum fær fullan rætt til hana at kanna triðjalandsfisk, sum verður lagdur upp í Suðuroy og skal sendast til okkurt ES land.

Annars var talan bara um at gera tvær bip-støðir í Føroyum, eina í Havn og eina í Kollafirði.

Men tað hevði verið óliviligt hjá vinnulívinum í Vági.

Tað kemur nógvur triðjalandsfiskur upp í Vági og tað hevði verið ótolandi um teir skulu til Havnar, ella onkra havn norðanfyri fyrst at fáa lastina góðkenda, áðrenn teir kundu koma til Vágs.

– Fyrr hava skip, sum hava lagt triðjalandsfisk upp í Vági, verið noydd at fara til Havnar fyrst at »bippa inn«, sum tað nevnist á fakmáli og tað kann ikki vera meiningin, sigur Johan Dahl.

Hann sigur, at er triðjalands fiskurin fyrst góðkendur á eini bip-støð, hevur hann frítt at fara í øllum ES.

Tú heldur hann, at tað er neyðugt at gera bip-støðir í øllum høvuðshavnunum í landinum og tað heldur hann eisini, at vilji er til.

# Mugu gera ábøtur fyri 300.000 krónur



*Ljóðviðurskiftini í skúlanum í Hvalba eru so út av lagi vánalig, at Arbeiðseftirlitið hevur kravt, at stórar stórar ábøtur verða gjørdar beinanvegin*

**Arbeiðseftirlitið hevur kravt stórar ábøtur á Skúlan í Hvalba. Sumt av tí skal gerast beinanvegin**

HVALBA
*Áki Bertholdsen*

Tað kom Hvalbiar Kommunu ógvuliga dátt við, tá ið hon nú ein dagin fekk bræv frá Arbeiðseftirlitinum í Havn.

Arbeiðseftirlitið var fyrr í ár og kannaði skúlan og dómurin harður, at Eftirlitið krevur at stórar ábøtur verða gjørdar á skúlan.

Fyrr í ár varð tað álagt skúlum at fáa viðurskiftini kannað og tað vóru serliga ljóðviðurskiftini, sum Arbeiðseftirlitið kannaði.

Úrslititið av kanningini vístu, at ljóðviðurskiftini vóru út av lagi vánalig.

Tey vóru so vánalig, at Arbeiðseftirlitið krevur at stórar ábøtur verða gjørdar, annars verður skúlin stongdur.

Men eftirlitið góðtekur, at ábøturnar verða gjørdar í stigum.

Í nøkum rúmum í skúlanum er støðan serliga ring og har skulu ábøturnar gerast beinanvegin. Í øðrum rúmum er støðan ikki heilt so ring og tær ábøturnar kunnu gerast eitt sindur seinni.

Ábøturnar, sum skulu gerast, eru ikki so ógvuligar og umfatandi, men tær eru rættiliga dýrar og tær verða ein stór, óvæntað rokning hjá kommununi.

Fólk, sum hava skil fyri slíkum viðurskiftum hava mett fyri Kommununi, at trupulleikin kann loysast við at festa »akustiskar kassar«, ella »kasettur«, sum tað verður nevnt á fakmáli, upp undir loftið.

Kostnaðarmetingar siga, at hetta fer at kosta góðar 300.000 krónur við mvg.

Men kommunan ætlar ikki at liggja á boðunum.

Á bygdaráðsfundi hóskvøldið varð samtykt at útvega nágreiniligar kostnaðarmetingar og nágreiniligt yvirlit yvir tað, sum skal gerast, so at Bygdaráðið kann taka endaliga støðu á næsta fundi, sum verður seinni í mánaðinum.

Á bygdaráðsfundinum varð møguleikin nevndur at gera so nógv av arbeiðnum, sum tilbar, í jólaferiuni.

Møguliga fór tað at føra við sær, at jólaferian fór at vara nakrar dagar longri enn ætlað, men Bygdaráðið vónaði, at skúlastýri og myndugleikar annars skiltu støðuna og góðtóku tað, at skúlin ikki byrjaði aftur til tíðina av tí at talan var um eitt mál, sum ikki kundi bíða.

# KODA roynir at steðga Rás 2

**KODA hevur biðið fútan at steðga sendingunum hjá Rás 2, tí rásin ikki vil gjalda KODA-pengar. Rás 2 tvíheldur um, at KODA ongan rætt hevur at krevja pengar inn í Føroyum og sendir sum vanligt**

PENGASTRÍÐ
*Eyðun Klakstein*



*Rás 2 noktar at gjalda KODA pengar fyri tann tónleik, sum rásin spællir. Petur Jacobsen, stjóri, er sannførdur um, at KODA hevur als ikki loyvi at krevja pengar inn í Føroyum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Danski felagsskapurin KODA hevur biðið fútan um at kvetta sambandið hjá Rás 2 við sendimastrina, tí útvarpsrásin vil ikki gjalda felagsskapinum pengar fyri at spæla tónleik.

KODA umsitir rættindini hjá yrkjarum og komponistum og krevur pengar inn fyri nýtsluna av tónleiki í danska kongaríkinum.

Rás 2 noktar at gjalda KODA pengar fyri sítt brúk av tónleiki, tí teir halda, at KODA hevur ongan rætt at krevja pengar inn í Føroyum.

– Eg havi biðið KODA vísa mær heimildina, sum teir hava fyri at krevja pengar frá okkum, og so skal eg nokk gjalda. Men tað hava teir ikki kunnað víst mær, og tí fáa teir ongar pengar frá okkum, sigur Petur Jacobsen, stjóri á Rás 2.

– Eg kenni meg sannførdan um, at KODA als ikki kann krevja pengar inn í Føroyum, tí eingin lógarheimild er fyri hesum. Hvørki KODA ella fútin hava kunna víst mær hesa lógarheimild, sigur hann.

### Klaga til lógarmálaráðið

Fútin hevur roynt at steðga Rás 2 í at senda tónleik, eftir at KODA ongar pengar fekk frá útvarpsrásini.

Petur Jacobsen noktaði tó at gera eftir boðunum hjá fútanum, fyrr enn hann kundi síggja prógv fyri, at hann átti at gjalda fyri hesa nýtsluna.

Fútin hevur síðani boðað KODA frá, at hann ikki hevur viljað avbrotið sendingarnar hjá Rás 2, og hetta hevur fingið KODA at venda sær til danska lógarmálaráðið fyri at fáa teir at leggja uppí.

Málið kann tykjast fløkt, men sjónarmiðini eru púra greið. KODA heldur seg hava rætt til at krevja pengar inn í Føroyum vegna tey tónaskøld, sum teir umsita rættindini hjá, meðan Rás 2 tvíheldur um, at KODA hevur einki at gera í Føroyum, tí eingin heimild er fyri teirra virksemi her.

– Vit skulu hava lógarverk á hesum økinum, og best var, um vit fingu eina føroyska skipan, so føroyskir tónleikarar eisini fingu ágóðan av hesum pengunum. Í løtuni verður ein rúgva av pengum sendir av landinum, men vit fáa bert ein lítlan partur aftur til landið, sigur Petur Jacobsen.

Í dag verður fundur í felagsskapinum Føroysk Tónaskøld, og har verður KODA væntandi eitt heitt evni.